## Minnisferð

Um vikuskiftið vóru 43 fólk úr Esbjerg eina serliga ferð tvørtur um Norðsjógvin. Tey 43 eru avvarðandi hjá 16 donskum fiskimonnum, sum doyðu, tá eitt týskt herskip søkti tvey skip úr Esbjerg í februar í 1940. Á ferðini við varð steðgað á staðnum, har tey bæði skipini vórðu søkt, og tey avvarðandi fingu høvi at tveita blómur á sjógvin. Kanningar hava avdúkað, at tað týska herskipið sigldi tey bæði donsku fiskiskipini niður.

## Sigldi á land

Hvørja einastu viku siglir okkurt skip á land í Danmark, og hendan vikan var ikki meiri enn byrjað, tá tað fyrsta stóð. Hesaferð var tað farmaskipið ”Coronia”, sum sigldi á eina grynnu í Oyrasundi úti fyri Kastrup í nátt. Danska bjargingartænastan sendi alt fyri eitt eitt skip at kanna, um olja lak úr skipinum, men so var ikki. Samstundis skuldi løgreglan kanna, um yvirmenninir á brúnni høvdu drukkið. ”Coronia” var á veg til Estlands eftir farmi.

# Byggja barnagarð í nýggjum býlingi

**Klakvíkar Býráð tekur eitt tak fyri at nøkta tørvin á barnaansingini**

BARNAANSING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Klaksvíkar Kommuna ætlar nú at byggja ein stóran barnagarð afturat í Klaksvík.

Í løtuni eru tey í ferð við at byggja barnagarð á Traðargøtu til 60 børn.

Tann barnagarðurin verður liðugur mitt í summar og tá verður beinanvegin farið undir at fyrireika ein barnagarð afturat.

Hesin barnagarðurin skal byggjast í nýggja býlinginum undir Grashjalla í Helnarbrekku.

- Har eru 48 grundstykki útstykkjað og nú verður farið at útstykkjað 48 stykki afturat.

Har verða sostatt 96 hús, táið avtornar.

Harafturat verða eisini íbúðarblokkar bygdir, so tilsamans verður talan um ein stóran býling.

Steinbjørn Jacobsen borgarstjóri, sigur, at nú er so ætlanin at byggja barnagarð í hesum nýggja býlinginum.

Hann sigur, at talan verður um eina barnagarð og vøggustovu til ímillum 40 og 60 børn, tað er ikki endalig støða tikin til tað enn.

Málið er ikki viðgjørt á býráðsfundi enn, men bæði sosiala nevnd og fíggjarnevnd eru samd um at fara undir bygginginа, so borgarstjórin ivast onga løtu í, at býráðið eisini samtykkir ætlanina.

Í ár er so ætlanin at fyrireika bygginginа, so at spakin kann setast beinanvegin tíðliga í næsta ár.

Borgarstjórin sigur, at ætlanin er, at talan skal vera um eina skjóta og einfalda bygging, so at barnagarðurin kann takast í nýtslu so skjótt sum gjørligt.

Hann væntar ikki, at tað skuldi tikið meiri enn eitt ár at bygt stovnin.

Annars standa eini 80 børn á bíðilista at sleppa í dagrøkt. Av teimum sleppa 60 børn inn í barnagarðin, sum verður tikin í nýtslu í summar.

Tá ið so barnagarðurin undir Grashjalla verður liðugur um eitt ár, fer at nærkast, at tørvurin verður nøktaður, hóast tað legst til alla tíðina.

### Søgulig bygging

Barnagarðurin, sum nú er í gerð á Traðargøtu, er í veruleikanum ein søgulig bygging, tí hetta er fyrstu ferð yvirhøvur, at Klaksvíkar Býráð byggir ein stovn.

Annars hevur kommunan bara keypt hús, til tey endamál, sum brúk hevur verið fyri húsi til.

Men tað er ikki meiri enn næstbest at keypa gamalt so tað er í veruleikanum eitt nýbrot hjá kommununi, at nýggjur barnagarður verður bygdur.



*Klaksvíkar Kommuna byggir barnagarð til 60 fólk og tað er ein søgulig bygging. Tá ið hon er liðug, skal ein stórur barnagarður byggjast afturat*

# Klaksvíkingar framvegis ósamdir um Gerðarbø

**Nú fer Klaksvíkar Býráð at samtykkja nýggjan býarskipan, men tað er ikki semja um, antin umstríddi Gerðarbøur skal friðast ella ikki**

BÝARSKIPAN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Arbeiðið at gera nýggja býarskipan fyri Klaksvík er við at koma undir land.

Arbeiðið at endurskoða býarskipanina er komið so mikið áleiðis, at nú er at kalla klárt at leggja málið fyri býráðsfund.

Steinbjørn O. Jacobsen dylir ikki fyri, at hann er spentur at vita, hvussu tað fer at gangast.

Í býarskipanini verður ásett, hvar bústaðarøki skulu vera, hvar fríøki skulu vera og hvar ídnaðarøki og ítróttarøki skulu vera.

Sostatt eru eisini ásett, hvussu skal vera við økjum, sum í dag eru óbygd.

Herfyri var borgarafundur um nýggju býarskipanina. Borgarafundurin var ógvuliga fjølmentur, tí har vóru eini 800 fólk og tey høvdu nógvar viðmerkingar til ætlanirnar hjá býráðnum.

Borgarstjórin sigur, at allar hesar viðmerkingar eru tiknar við, men hann staðfestir eisini, at býráðið hevur ikki gingið øllum ynskjum á møti, tí tað ber ikki til.

Ikki skerst burtur, at eitt, sum hevur havt serliga áhuga hjá klaksvíkingum, er, hvørja lagnu tann umstríddi Gerðarbøurin skal fáa.

Býráðið hevur áður samtykt at byggja handilsbygning har, men hetta hevur loypt øði í nógvar klaksvíkingar, tí tey vilja hava bøin friðaðan.

Og borgarstjórin staðfestir, at tað helst ikki semja í býráðnum um Gerðarbø.

- Summir býráðslimir vilja hava hann friðaðan, aðrir halda, at tað er onki í vegin fyri at byggja á honum, partvís.

Sjálvur heldur borgarstjórin, at tað er onki í vegin fyri at byggja á einum parti á honum. Hann vísir á, ein gamla gøta út í Grøv og hon skal í hvussu so er varðveitast og nakað afturat niðan frá henni.

Í nýggju býarskipanini, hevur umisitngin hjá býráðnum sett Gerðarbø av til almenn endamál og til íbúðarbygging.

Men nú skal málið so til politiska viðgerð í býráðnum.

Tá ið býráðið hevur samtykt ætlanina, skal býarskipanin liggja frammi í eina tíð, so at almenningurin fær høvi at gera sínar viðmerkingar, sigur borgarstjórin.

So skal býráðið viðgera málið einaferð afturat og samtykkja býarskipanina fyri aðru ferð, áðrenn hon verður send landsstýrinum, sum skal staðfesta hana.



Les Sosialin so ert tú við